UTTAN ÚR HEIMI

## Sleppur ongan veg

Myndugleikarnir í Ísrael hava gjørt av, at kjarnorkuverkfrøðingurin Mordechai Vanuno skal halda seg innan fyri ísraelska landamarkið í minst tólv mánaðir afturat, tí sambært myndugleikunum er hann ein hóttan ímóti landsins trygd.

Í 1986 varð Vanuno dømdur átjan ára fongsul fyri at hava avdúkað ísraelsk hernaðarloyndarmál í einari samrøðu við bretska blaðið Sunday Times. Av teimum átjan árunum sat hann samfull tólv ár fyri seg sjálvan.

Síðani hann slapp úr fongslinum í fjør, hevur Vanuno søkt um uppihaldsloyvi í fleiri londum. Herfyri bað hann um at sleppa til Noregs, men norska stjórnin segði seg ikki kunna veita honum uppihaldsloyvi.

Ísraelska stjórnin sigur, at Vanuno má ikki tosa við útlendsk tíðindafólk teir næstu tólv mánaðarnar. Fólk, sum eru ímóti avgerðini hjá stjórnini, siga, at í veruleikanum er Vanuno politiskur fangi í Ísrael, og at avgerðin hjá stjórnini er í stríð við altjóða reglur um politisk og sivil rættindi.

## Professarar mótmæltu

Týsdagin gingu umleið hundrað professarar mótmælisgongu uttan fyri tann størsta lærda háskúlan í egyptiska høvuðsstaðnum Kairo.

Hetta var aðru ferð, at teir egyptisku professarnir gingu mótmælisgongu, har teir mótmæltu, at teir politisku myndugleikarnir leggja seg út í arbeiðið á teimum lærdu háskúlunum. Tann fyrra mótmælisgongan var ttan fyri ein lærdan háskúla har suðuri í landinum mánadagin.

Mótmælisgongan týsdagin endaði við, at professararnir handaðu myndugleikunum eitt skriv, har teir mótmæla, at tær egyptisku trygdardeildirnar leggja seg út í viðurskifti á háskúlunum. Teir mótmæltu eisini, at ein professari er sagdur úr starvi utta nakra greiða grundgeving.

Síðani Hosni Mubarak, forseti, broytti grundlógina fyri trimum mánaðum síðani, hava altsamt fleiri egyptar kravt st'ørri nýskipanir og meiri demokrati í landinum, skrivar AP úr Kairo.

## Stór framgongd

Tann stóri búskaparvøksturin í Kina stendur við, og tølini fyri fyrsta ársfjórðing í ár vísa, at bæði íløgur og framleiðsla hava næstan sett nýtt met.

Vøksturin í búskapinum var 9,5 prosent í januar ársfjórðingi og sostatt á leið tannn sami sum í sama tíðarskeiði í fjør, tá vøksturin var 9,7 prosent. Tølini vísa, at framleiðslan í ídnaðinum vaks heili 16,2 prosent, men tað var kortini hálvt annað prosent minni enn tríggjar teir fyrstu mánaðarnar í 2004.

Kinesarar hava gjørt stórar íløgur í samferðslukervið tey seinastu árini, og soleiðis er eisini í ár. Í januar ársfjórðingi vuksu íløgurnar 22,8 prosent, og tað var á leið sami vøkstur sum í sama ársfjórðingi í fjør.

## Fekk 640 ára fongsul

Fyrrverandi argentinski heryvirmaðurin Adolfo Scillingo hevur fingið 640 ára fongsul fyri fólkamorð, yvirgang og fyri at hava pínt fangar undir hernaðarstýrinum hjá Augusto Pinochet, forseta.

Adolfo Scillingo bleiv stevndur fyri ein dómstól í Madrid, og hann er tann fyrsti, sum er ákærdur í Spania fyri at hava brotið mannarættindini í einum øðrum landi. Hann bleiv eisini dømdur í Madrid. Rætturin staðfesti millum annað, at hann hevði tveitt 30 livandi fangar úr einum flogfari niður í havið.

Ákæruvaldið kravdi hann dømdan meiri enn 9.000 ára fongsul.

# Bernedikt 16. fær blandaða móttøku



*Týski kardinaurin Joseph Ratzinger eitur nú Benedikt pávi 16. Hann arbeiddi saman við undanmanninum í mong ár og verður hildin at vera minst líka afturhaldssinnaður sum hann*

**Leiðarar um allan heim hava fagnað tí nýggja pávanum, men mong halda hann vera ov gamlan og afturhaldssinnaðan**

PÁVAVAL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í Rom vóru umleið 100.000 fólk á Pæturstorginum og fagnaðu tí nýggja pávanum, og í Týsklandi var stór frøi, nú kardinalarnir høvdu valt tann fyrsta týska pávan í næstan 500 ár.

- Tað er ein stórur heiður fyri alt Týskland og allar týskarar, at Benedikt 16. er úr Týsklandi. Hann er ein virðiligur eftirmaður hjá Jóhannesi Páll páva Øðrum, segði týski kanslarin, Gerhard Schrøder, í sínari viðmerking til pávavalið. Hann legði afturat, at tann nýggi pávin kennir ta katólsku kirkjuna betur enn nakar annar, og at hann er ein viðurkendur guðfrøðingur.

Joseph Ratzinger, sum nú eitur Benedikt 16., er ættaður úr býnum Markti í Bayern, og har savnaðust fólk í stórum tali at fagna tí nýggja pávanum.

**Afturhaldssinnaður**

Men minni enn so allir katolikkar eru líka fegnir um tann nýggja pávan. Í Kanada og í USA eru nógv fólk vónsvikin, tí sum kardinalur hevur Joseph Ratzinger gjørt greitt, at hann er ímóti fyribyrging og fosturtøku. Hann hevur eisini blankt víst aftur at viðurkenna rættindi hjá samkyndum, og hann er eisini ímóti, at kvinnur kunnu virka sum prestar í katólsku kirkjuni.

Í Suðuramerika er tann nýggi pávin heldur ikki serliga væl umtóktur. Har vísa tey ár, at Ratzinger stríddist ímóti teimum frælslyntu guðfrøðingunum, sum fóru at gera um seg í Suðuramerika í sjeyti- og áttatiárunum, og sum settu seg upp ímóti hernaðarstýrunum við kravi um rættvísi og demokratiskar nýskipanir.

- Hatta var tað ringasta, sum kundi henda. Hann fer at halda somu kós sum undanmaður hansara, sigur argentinski guðfrøðingurin og professarin Ruben Dri við AP.

Eisini í Danmark eru katolikkar misnøgdir við pávavalið, tí teir halda hann vera alt ov afturhaldssinnaðan, og í Italia og Fraklandi verður roknað við, at undir hansara leiðslu fer tann katólska kirkjan at missa nógvar limir.

# Russar givnir at kanna hópmorð

**Russisku myndugleikarnir eru givnir at kanna, hvat hendi, tá fleiri túsund polskir heryvirmenn vórðu avrættaðir í 1940**

KANNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri einum mánað síðani góvust russisku myndugleikarnir at kanna tilburðin, tá tann loyniliga sovjetska løgreglan avrættaði fleiri túsund polskar heryvirmenn í Katyn-skóginum uttan fyri býin Smolensk í 1940.

Russar vilja vera við, at tað finnast prógv fyri, at umleið 1.800 fólk vórðu avrættað, men polskir søgufrøðingar siga, at minst 14.000 pólendingar vórðu avrættaðir í Katynskóginum. Í 1943 funnu týskir hermenn líkini av 4.500 polskum heryvirmonnum í fleiri hópgravum í skóginum.

Í 1990 viðurkendi Mikhail Gorbatjov, at Sovjetsamveldið hevði fulla ábyrgd av tí, sum hendi, og í 1992 handaði Boris Jeltsin polska forsetanum Lech Walesa loynilig skjøl, sum vístu, at tað var Josef Stalin, sum gav boðini um at myrða teir polsku fangarnar.